miðvikan
Nr. 149 • 23. juli 2008
Siðsøguligt tilfar
í Sosialinum mikudagar

**Í grannalagnum hjá Tróndi í Gøtu:**

# Lagnudagurin í 1944

**Nú er Tórir so tilkomin, at hann fer til skips. Hann er eisini á útróðri tann dagin, tríggir gøtumenn ganga burtur á Gøtuvík. Seinni fer hann at fáast við gørn og nótir, og hetta gerst hansara lívsstarv**



Óli Jacobsen
olij@sosialurin.fo

**4. partur**

**Til skips**

Eg fór til skips í 1937, so eg var nokk so tilkomin. Tá fór eg við Vilhelminu, sum tá hoyrdi heima á Skála. Vit fóru á Suðurlandið. Eg var so forharmaður um, at eg var farin, tí eg var so ringur av sjóverki, at eg ynskti meg at vera heima aftur. Vit royndu í Meðallandsbuktini. Eg haldi, at vit vóru burtur í tríggjar vikur. Veiðan var 150 skippund. Vit fóru aftur ein túr og fingu eitt sindur meira. Tá varð skipið leigað til Íslands til sildafiskarí. Eg hevði bert mynstrað fyri Suðurlandið, so eg slapp ikki við. Skipari var Poul Huus, sum var systkinabarn mammu mína.

Eg fór so við Columbus við Oliver Thomsen, sum var ættaður úr Norðragøtu. Vit fóru yvir á Eysturlandið. Tá ið vit komu heim aftur, fór eg aftur at royna eftir sild við pápa.

Í 1938 fór eg aftur við Vilhelminu á Suðurlandið. Men aftaná tað fór eg við Bearnaise hjá S. P. Petersen úr Fuglafirði. Hetta var eitt so stórt skip. Vit royndu við bátum í Grønlandi og fingu 1.000 skippund. Hon var so stór, at hon tók væl meira enn tað.

Í 1939 fór eg við Vilhelminu á sild til Íslands. Kristian Holm Jacobsen hevði leigað hana. Men tað var so lítið av sild hetta árið. Tað riggaði ikki væl hjá okkum heldur.

Men í 1940 fekk eg kjans við Kyrjasteini við toskagørnum. Kyrjasteinur varð roknaður fyri at vera ein tann besti kjansur í landinum tá í tíðini. Vanligt var at keypa gomul skip, og í hesum tíðum vóru nógvar brúktar fransaskonnartir bygdar.

Tað vóru einstakir, sum lótu nýggj skip byggja, serliga í Danmark. Jákup Haraldsen, ættaður úr Elduvík, búsitandi í Fuglafirði, lat Kyrjastein, sum var 148 brt., byggja í Korsør í Danmark. Hann var roknaður fyri at vera eitt stásiligt stórt far og var væl størri enn tær gomlu sluppirnar.

Vit fingu gott 500 skippund. Síðan var farið til Íslands á sild. Vit fingu 16.000 mál. Hvørt mál var 135 kg. Inntøkan var 2.800 krónur. Hetta var góð inntøka tá. Hendrik í Bug, verfaðir mín, ættaður frá Gøtugjógv, búsitandi í Fuglafirði, var skipari.

Í 1941 var eg heima. Skipini vóru byrjaði at sigla niður við keyptum fiski. Tá sluppu ungir dreingir ikki við. Familjumenn vórðu tiknir fram um. Men í 1942 fór eg aftur við Kyrjasteini. Tá fóru vit við toskagørnum til ísfisk. Vit gjørdu tveir góðar túrar undir Íslandi. Vit fóru síðan á sild um summarið. Tað gekk væl, og vit fingu eini 17.000 mál.

Í 1943 vóru vit aftur við gørnum. Vit fingu aftur tvær ferðir uppí skipið. Á ísfiski kundi mann ikki fiska so leingi. Tað mesta var 10 dagar. Vit landaðu í Aberdeen og settu meginpartin av fólkinum av í Føroyum, tá ið farið var til markna.

Í 1944 var eg heima. Tá royndu vit eftir sild. Tað gav nokkso nógv.



*Tórir og Fía*



*Døturnar Hjørdis og Katrin rokast í køkinum*

## Vanlukkan á Gøtuvík

Hetta ár, 1944, tann 14. februar hendi ein druknivanlukka á Gøtuvík. Hendan dagin var eg sjálvur til útróðrar og minnist dagin sera væl.

Um morgunin boðaði pápi til útróðrar. Veðrið var av tí allarbesta. Vit vóru fýra mans. Pápi var formaður. Umframt meg og pápa vóru Jóhannes Gøthe, á Fløtti, og sonur hansara Eyði við. Vit sigldu út á Mjóvanes. Tá spyr pápi Jóhannes: “Hvar er best at fara”. Jóhannes svarar: “Tað skal tú ráða fyri.” So sigur pápi, at vit skulu fara út á Krossbrekkuna, umleið ein tíma og trý korter at sigla frá Mjóvanesi. Tað var soleiðis, at menn duldu síni mið, fyri at aðrir ikki skuldu leggjast á tey. Hetta var eisini galdandi fyri Krosbrekku.

Vit sigla so úteftir. Veðrið er gott. Nú fer at nærkast á mál, men tað er ikki miðalýsi. Vit eru komin út á Skallan. Tá helt pápi, at vit skuldu kasta. Har vóru einkultir fiskar, men so fóru vit á Krossbrekkuna. Pápi leggur á miðið, og har er í heinta av toski. Vit eru so har, og nógv er at fáa. Men nú er vindurin farin at vaksa. Vit komu at borði við tveimum fiskum á. Pápi sigur, at “tit kasta ikki niður aftur.” Hann biður Johannes og Eyða gera seglið klárt. Eg fór at stýra, og vit fóru at sigla. Vit hildu móti Borðoyanesi fast Gøtunes. Tá ið vit koma móti Gulenni var Hálsíðan ikki fráskotin. Har var óslætt, so vit biðja teir taka og repað seglið. So nú rópar pápi: “Seglið upp og full ferð á motorin,” og vit komu heim um í øllum góðum.

So sigldu vit norð við Líðum, norð á Háskúlan í Føgrulíð, og síðan yvir í Galvin. Síðani hildu vit yvir um ímóti Lorvík. Pápi sigur so við Jóhannes: “Skulu vit seta upp?” Jóhannes svaraði, at tað skuldi pápi ráða fyri. Pápi segði, at hann helt, at eysturferðin var ikki komin. Vit fóru og tað gekk væl. Tá vit komu at landi varð frætt um vanlukkuna. Teir, ið fórust, vóru Andreas Petur í Guttastovu og brøðurnir Poul Kristoffur og Dánjal Poulsen.

## Á sild

Í 1945 fór eg við Boðasteini hjá Jákup Haraldsen á sildaveiðu. Men tað var lítið at fáa.

Í 1946 fór eg aftur við Kyrjasteini. Tá fóru vit at salta sild umborð saman við Boðasteini hjá sama reiðarí. Vit høvdu nótina og koyrdu part av sildina umborð á Boðastein. Bæði skipini saltaðu. Vit fingu nokk so nógv, og vit løgdu veiðuna upp í Gøtu.

Tá var sjómarkið farið út í Íslandi, og tað var ikki loyvt at koma inn um 3 fjórðingar. Tað var eitt sindur keðiligt, tí mesta sildin var innanfyri hetta mark.

Í 1947 var farið við snøri til Íslands til saltfisk. Vit vóru tveir túrar og fingu 900 skippund hesar túrar. Vit vóru væl mannaðir 27 mans.

Vit fóru aftur á sild um heystið. Tað gekk ikki væl.

Í 1948 gjørdu teir skipið út til línu. Tá varð Per Gregersen skipari. Eg var bestimaður. Vit vóru á Suðurlandinum og fingu 400 skippund. So fóru vit til Grønlands. Har var ein øgiligur fiskur. Vit høvdu 27 setur, vit fingu 800 skippund.

Í 1949 fóru vit aftur fyrst til Ísland, síðan til Grønlands, og hetta er síðsti túrur, eg havi verið til skips.

Hetta heystið fór eg aftur at fiska sild við pápa á Skálafjørðinum, tað var væl at fáa.

## Trol og gørn

Nú koma vit til 1950. Vit veiddu framvegis sild bæði á Gøtuvík og Skálafjørðinum.

Um summarið fann eg uppá at fara at arbeiða uppá trol saman við Hans Petur Nielsen. Hann var úr Heiðunum, men búði í Fugla-